5 tær bestu

# Fimm tær bestu fløgurnar í mínum fløgusavni

Ein góð fløga skal flyta meg kensluliga, hon skal svinga og vera væl spæld, og so skal tónleikurin vera góður. Tónleikastílurin er ikki týdningarmikil sigur Jónas Bloch Danielsen

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Jónas Bloch Danielsen hevur seinastu árini ferðast kring allan heim, sum ljóðmaður hjá Teiti. Gerandisdagurin er fyltur við tónleiki, bæði á konsertunum og í bilinum á teimum ofta longu biltúrunum, tí stórur partur av fløgusavninum er við á hansara Ipod.

Jónas hevur livað av at fáast við tónleik í síðan fyrst í 90' unum. Hann hevur útbúgving sum ljóðtøkningur úr Avstralia, og hevur arbeitt úti og heima í útvarpi, sjónvarpi, sum upptøkutøkningur, ljóðblandari av fløgum, og hevur gjørt ljóð á nógvum hundra konsertum. Hann er uttan samanbering Føroya mest royndi ljóðmaður.

Føroya best dámdi bólkur í løtuni 200, hevur kosið Jónas tann fjóra limin í bólkinum. Hann hevur tikið báðar fløgurnar hjá bólkinum upp, og ger ljóð hjá teimum, tá teir spæla konsertir.

## Spælir gittar

Men Jónas er eisini gittarleikari, seinastu 8 árini hevur hann spælt gittar í MC-Hár, og var eisini eitt mundið gittarleikari á barrum í Havn, tá hann og Eyðun Ásason fyltu støð sum Manhattan, Mimir og Cleopatra vikuskifti eftir vikuskifti.

## Fjølbroytt fløgusavn

Planet.fo hevur biðið Jónas um at valt fimm tær bestu fløgurnar burtur úr teimum nógvu hundra, ið hann hevur á hyllunum í íbúðini á Oyrasundskollegiinum. Fløgusavnið er sera fjølbroytt, við flest øllum tónleikastílum umboðaðum. Ein góð fløga skal flyta meg kensluliga, hon skal svinga og vera væl spæld, og so skal tónleikurin vera góður. Tónleikastílurin ikki týdningarmikil, sigur Jónas, mær dámar so ótrúliga nógv ymiskt.

Nøvn sum Led Zeppelin, Grant Green, Bjørk, The Clash, Pink Floyd, Neil Young, Griffin House, Teitur og AC DC eru uppi og venda, áðrenn hann velur júst tær fimm, ið hann metir eru tær allar bestu.

## Coleman Hawkins encounters Ben Webster




Hetta er ivaleyst besta fløga í mínum savni. Eg keypti hana fyri umleið fimtan árum síðan. Eg hoyrdi hana hjá mammubeiggja mínum og fór beint at keypa hana. Hetta er vælsvingandi jassur, við nøkrum av heimsins bestu tónleikarum. Har eru umframt Hawkins og Webster, Oscar Peterson, Alvin Stoller, Herb Ellis og Ray Brown. Fløgan ljóðar ordiliga væl. Serliga væl saman við konufólki.

Á fløguhúsanum stendur "An excellent comparison between Hawkins and Webster - perhaps the best ever recorded" og eg eri púra samdur. Hetta eru tveir gamlir jassguðar sum hittast

## Sonic Youth - nurse



Hetta er ein fløga, sum eg havi lurtað ótrúliga nógv eftir í bilinum, meðan eg havi koyrt runt við Teiti. Sonic Youth er ein gamal bólkur, sum rokkar uppá tann harða og stuttliga mátan, og bólkurin gerst bara betur við árunum. Sonic Youth var uttan iva besta innslag á Roskilde Festivalinum í ár. Eg keypti fløguna, meðan eg var í USA. Eg hevði hoyrt um Sonic Youth í nógv ár, men hevði ongantíð sett meg inn í tónleikin. So keypti eg eina fløgu og varð blástur um koll.

## Beach Boys - Pet sounds




Pet sounds er nokk ein tann besta fløgan, sum nakrantíð er gjørd. Bæði reint musikalskt og við instrumenteringini er hon heilt fyri seg. Hon liggur sum grund undir nógvum av tí, sum vit lurta eftir í dag. Mær hevur altíð dámt væl the Beatles, og eg síggi Beach Boys, sum eitt náttúrligt stig har frá, tað er í sama flokki. Eg keypti fløguna stutt eftir, at eg var fluttur niður. Vinmaðurin hjá mær Bøkkurin vísti mær hana.

## Johnny Cash - American IV: The man comes around




Hetta er ein fløga í røðuni American Recordings, sum Rick Rubin hevur framleitt. Johnny Cash tolkar løg hjá bólkum, sum Depeche Mode, Sting, Nine Inch Nails og øðrum. Røðin kom út stutt aftan á, at Cash var deyður. Johnny Cash er ein av kulastu songrøddunum og tónleikarum í okkara tíð. Fløgan er framleidd so einfalt, at røddin berur fløguna, sjálvandi stuðlað av framúrskarandi tónleikarum. Hon hevur ein gjøgnumførdan stíl og stemning, sum man ofta saknar hjá nýggjari bólkum.

## 200 - Viva la Republica

SJÁLVANDI! Tann viktigasta føroyska fløgan nakrantíð.

